# Næstan hvønn dag á vøllinum

**Viðareiði:** Tað er ikki dagur at ikki onkur drongur ella vaksin er at síggja á fótbóltsvøllinum í bygdini.

So skjótt sum skúlin er liðugur plaga teir fyrstu dreingirnir at síggjast á vøllinum, og um kvøldið plaga teir vaksnu menninir í bygdini ofta at manna lið til dyst.

Nógvir av dreingjunum spæla eisini við liðum hjá KÍ í Klaksvík, og taka bara hesar dystirnar á »heimavølli« sum eina eyka venjing.

Henda eina dagin vit vitjaðu í bygdini vóru teir sjey dreingir sum spældu saman á graslíkisvøllinum. Teir vóru so mikið fáir, at teir ikki fingu manna lið, so teir spældu bara uppá eitt mál.

Teir sjey dreingirnir vóru: Emil Simonsen (13 ár), Jóannes Sivertsen (9), Samson Samson (7), Eivin Sørensen (9), Jóhannus Poulsen (13), Eli Heinesen (12) og Helgi Samson (13).

**sb.**



*Teir venja seg í at skalla bóltarnar í netið á vøllinum á Viðareiði. Hetta er góð venjing, tí einaferð verður kanska onkur teirra at síggja á 1. deildarliðnum hjá KÍ*

*Mynd: Bárður*



*Teir sjey dreingirnir, sum henda fríggjadagin mannaðu viðareiðisliðið vóru hesir – úr vinstru síðu: Emil Simonsen (13 ár), Jóannes Sivertsen (9), Samson Samson (7), Eivin Sørensen (9), Jóhannus Poulsen (13), Eli Heinesen (12) og Helgi Samson (13)*

*Mynd: Bárður*

## Russiskur tjóðardagur Føroyum

**Teir mongu russarnir fáa nú høvið at halda tjóðardag sín í Havn. Í dag eru væl omanfyri 50 russar í Føroyum**

TJÓÐARDAGUR
*Snorri Brend*

**Havn:** Sunnudagin 12. juni er Tjóðarhátíðardagur Russlands.

Henda dagin fara russiska konsulátið og Faroe Agency at hátíðarhalda á skrivstovuni Yviri við Strond 4. Allir russarar í Føroyum við familju verða tí bodnir til hugnaløtu frá kl. 15 til 18 sunnudagin í hølunum, sum vórðu tikin í nýtslu í oktober mánaði í fjør.

Sera stórur partur av virkseminum hjá Faroe Agency er knýttur at russum, og stjórin Árni Dam er russiskur heiðurskonsul.

Hetta er fyrsti tjóðarhátíðardagur, síðan Faroe Agency lat upp og Russiska konsulátið flutti í hølini. Tí er hetta eisini eitt upplagt høvi at bjóða russum í Føroyum at síggja skrivstovuna.

Júst, hvussu nógvir russar sum eru í Føroyum er ilt at meta um. Men sambært Árna Dam á Faroe Agency er talið á teimum nakað langt omanfyri 50.

Hesir russararnir finnast spjadir kring alt landið: Í Leirvík, Vágum, Vestmanna, Sundalagnum Havnini, Klaksvík og Gøtu, bara fyri at nevna nøkur av støðunum.

Allir hesir fáa nú høvið at hitta hvønn annan, tá tjóðardagur teirra verður hildin, og nú eisini á føroyskari grund.

## Í 1. deild



*1980: Eftir landskappingina í fótbólti hetta árið var greitt, at nýtt lið í 1. deild komandi kappingarár gjørdist B68 av Toftum. Hóast 25 ár eru liðin síðani myndin varð tikin, eru fleiri av monnunum enn virknir í fótbólti*

*Kelda: Árið ið fór*

## Keldan vantaði

Sosialurin bar í gjár tíðindi frá hendingini, tá sáttmáli um samstarv um barnaverndarmál varð undirskrivaður í Sandavági í farnu viku.

Av misgáum varð ikki nevnt, at hesi tíðindini og myndin vóru tikin av heimasíðuni hjá Sandavágs kommunu.

Nú er tað so gjørt!

**sb.**